Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Kristian Krog Hentze, løgtingsmaður

Svarari: Eyðdis Hartmann Niclasen, landsstýriskvinna í heilsu- og orkumálum

Evni: Ognartøka av festijørð eftir byggi-og býarskipanarlógini

Spurningar:

1. Nær fer landsstýriskvinnan at steðga ólógligu ognartøkuni av lendi og vatni í Heimastahaga-Norðaripartur í Skálavík?

Viðmerkingar:
Nær fer landsstýriskvinnan at steðga ólógligu ognartøkuni av lendi og vatni í Heimastahaga-Norðaripartur í Skálavík?

Viðmerkingar
Búnaðarstovan hevur tikið ræðið av festaranum í Heimastahaga-Norðaripartur, Skálavík, vísandi til § 1 í Lov nr. 172 av 1. maj 1937 for Færøerne om Haugers Styrelse og Drift m.m, fyri, at síggja til, at hjálpa Skálavíkar kommunu at ognartaka burturav Heimastahaga-Norðaripart, vísandi til Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.
Heimastihagi-Norðaripartur er samansettur av privatari og almennari ogn/festijørð.
Upp á fyrispurning frá Jacob Vestergaard, løgtingsmanni, svaraði táverandi landsstýriskvinna í uttanríkis- og mentamálum tann 3. mars 2026:
"Kommunur hava sambært § 12, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir heimild til at taka privata ogn móti endurgjaldi, tá ognartøkan er neyðug til at fremja tey í góðkendari byggisamtykt ætlaðu tiltøk.
Uttanríkis-og mentamálaráðið metir soleiðis ikki, at § 12, stk. 1 í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir gevur kommunum heimild til at ognartaka almenna ogn ella festijørð".
Nú nærum tveir mánaðir eru gingnir síðan svarið frá landsstýriskvinnuni, eru ongi stig tikin til at rætta skeivleikan. Tí verður spurt, nær nýggja landsstýriskvinnan fer at steðga ólógligu ognartøkuni.

Á Løgtingi, 4. mai 2026

Kristian Krog Hentze